# Minnisblað, tá tú verður biðin um at skriva tíðargrein, tá tú skrivar stíl í føroyskum á A-stigi

- Hetta minnisblaðið er leiðbeinandi.
- Tú skalt altíð halda teg til givnu uppgávuorðingina og leiðbeiningina til hana.

## Uppgávukrøv

- Sjónarmið í einum ella fleiri tekstum skulu lýsast.
- Samskifti í einum ella fleiri tekstum skal greinast.
- Sjónarmið í einum ella fleiri tekstum skulu umrøðast.

## Tú skalt vísa, at tú dugir:

- at nýta faklig amboð at viðgera tekst
- at nýta fakliga og almenna vitan at umrøða sjónarmið
- at grundgeva væl og skriva sjálvstøðugt
- at skriva neyvt og samanhangandi á røttum og hóskandi føroyskum máli

## Inngangurin skal:

- vekja áhugan hjá lesaranum at lesa víðari
- tríva í umrøðuna av evnum og harvið skapa samanhang í tíðargreinini
- kunna um tekstin (høvundur, heiti, ár)

## Lýsing av sjónarmiðum

- Sjónarmið í tekstinum eru í miðdeplinum. Tú skalt lýsa høvuðssjónarmiðini í tekstinum greitt og neyvt við atliti at, at lesarin ikki kennir tekstin frammanundan.
    - Skriva partleyst.
    - Vís til tekstin og brúka stutt sitat, tá tú skrivar.
    - Lýs sjónarmiðini eftir, hvønn týdning tey hava, heldur enn í tíðarrøð.

## Greining av samskifti

- Greiningin av samskiftinum savnar seg um, á hvønn hátt sjónarmiðini í tekstinum verða løgd fram fyri at náa lesaranum sum best. Tú skalt greina viðkomandi samskiftiseyðkenni í tekstinum, t.d. málslig eyðkenni og grundgevingarhættir. Ansa eftir, at tú ikki skrivar frymlakent og bara ramsar eina rúgvu av samskiftiseyðkennum upp.

## Umrøða av evnum

- Evni, sum teksturin snýr seg um, eru í miðdeplinum. Tað er týdningarmikið, at tú nýtir fakliga og almenna vitan, og at umrøðan er sjálvstøðug, saklig og væl grundað. Tú skalt ikki vera bundin at tekstinum, men umrøða í breiðari høpi.

## Útgangurin

- Útgangurin skal stutt taka samanum og vísa aftur til inngangin, soleiðis at samanhangur er í tíðargreinini.

## Skipan

- Umráðandi er, at ymsu partarnir í tíðargreinini hanga væl saman, soleiðis at lesarin klárar at fylgja við. Skiftini millum partarnar skulu vera lagalig. Hetta kann gerast við at skriva eitt stutt reglubrot ella ein setning millum partarnar, sum so leiðir lesaran frá einum parti til næsta.
- Til ber eisini at skipa tíðargreinina meira frítt, soleiðis at t.d. lýsingin av sjónarmiðum og greiningin av samskifti verða samanskrivað. Ein tílíkur bygnaður kann fáa samanhangin greiðari, men vandi er eisini fyri, at lesarin missir tráðin, tí bygnaðurin er ógreiður.
- Vís ikki til síðu- og reglutal í keldum, tað slítur samanhangin óneyðugt.
- Lat tíðargreinina fevna um umleið 1.200-1.700 orð. Lýsingin av sjónarmiðum eigur at fylla umleið $^1/_4$, greiningin av samskifti umleið $^1/_4$ og umrøðan av evnum umleið $^1/_2$. Harafturat koma inngangur og útgangur.